# ...dið at innfluttari rávøru



*- Hvussu tryggja vit, at okkara samfelag ikki bert verður ein útflytari av rávøru, men heldur kann mennast til eitt framkomið fiskivinnusamfelag, verður spurt í frágreiðingini*

Mynd: Jens Kr. Vang

Barentshavinum hevur verið rættiliga støðug samanborið við onnur veiðiøki.

– Umfatandi trupulleikar hava verið við eysturstrond Norður Ameriku, har eitt fyribils veiðibann er sett fyri nøkrum árum síðan.

Hvítfiskaveiðan í Norðuratlantshavi er eisini minkað munandi seinastu árini, og í hesum økinum vóru samlaðu hvítfiskalandingarnar umleið 3,4 miljónir tons í 1986. Í ár 2000 var sama veiða minkað niður í bert 1,6 miljónir tons.

– Væntað verður ikki, at landingarnar av toski fara at veksa munandi komandi árini. Hetta kann elva til, at toskurin fer at missa marknaðarpartar til onnur fiskasløg, soleiðis sum toskurin hevur gjørt seinastu 10 árini.

## Nýggj hvítfiskasløg

Seinastu árini eru "nýggj" hvítfiskasløg komin á marknaðin, sum í ein ávísan mun eru komin í staðin fyri vanligu hvítfiskasløgini sum toskur, hýsa og upsi.

– Aldur feskvatnsfiskur sum eitt nú "channel catfish" og "tilapia" mynda í dag ein alsamt størri part av samlaða útboðnum av hvítfiski.

Í frágreiðingini verður sagt, at samlaða framleiðslan av "tilapia" var umleið 1,9 miljónir tons í ár 2000 - ella næstan ein triðingur av samlaða útboðnum av hvítfiski, og meginparturin av hesi framleiðslu var alifiskur.

– Enn er bert ein lítil partur av hesi framleiðslu komin inn á heimsmarknaðin fyri hvítfisk, tí stórur partur av framleiðsluni av "tilapia" verður seldur til eitt nú Kina. Tó vísir núverandi gongdin, at ein alsamt størri partur, serliga av tilapia-framleiðsluni, verður selt sum fryst fløk á lágvirðis hvítfiskamarknaðinum.

## Hóttanir ella møguleikar

Í hesum partinum av niðurstøðuni, vísir Sendistova Føroya í London á, at talan er um ymisk rák og støðugar broytingar, bæði á heimsmarknaðinum og á bretska marknaðin fyri sjófóðslu.

– Hesi viðurskifti kunnu síggjast sum hóttanir, men tey kunnu eisini síggjast sum møguleikar fyri føroyskari framleiðslu og útflutningi.

Heimsnýtslan av sjófóðslu er í eini støðugari menning, og sannlíkt er, at við verandi gongd fer framtíðar útboðið av sjófóðslu at veksa lutfalsliga meira enn eftirspurningurin.

– Størsti vøksturin av sjófóðslu fer at verða í framleiðsluni av alifiski, sum fer at veksa munandi meira enn framleiðslan av veiddum fiski.

Í frágreiðingini verður sagt, at rákið í nýtsluhættunum hjá brúkarunum merkir, at hesir í størri mun fara at leggja seg eftir feskum køldum vørum, tí brúkarin gerst alsamt meira varugur um egna heilsustøðu, har góðska og føðslutrygd eru í hásæti. Haraftrat er gongdin hon, at tað skal gerast lættari og høgligari hjá brúkarunum at fáast við tilgerðina av sjómati.

Roknað verður við, at ein minking verður í útboðnum av siðvandu hvítfiskasløgunum, sum toski og hýsu, men hóast hesa afturgongd í útboðnum, tykist einki grundarlag vera fyri prís-hækkingum fyri hesi bæði hvítfiskasløgini.

– Orsøkin er hópframleiðslan av hvítfiski í londum sum Kina, sum forðar fyri einari avmarking í útboðnum av hvítfiski. Eisini er kappingin frá øðrum pritein-keldum sum eitt nú høsnarungum við til at ávirka prísin á hvítfski.

Hyggja vit at Stórabretlandi, so er staðfest, at landingarnar hjá bretsku fiskiførunum alsamt eru minkaðar, men samstundis er eftirspurningurin hjá brúkarunum eftir sjófóðslu í støðugum vøkstri.

– Hetta merkir, at Stórabretland er vorðið ógvuliga bundið at innfluttari rávøru - og tó hevur hesin vaksandi eftirspurningurin ikki elvt til munandi príshækkingar, tí ein stórur partur av innflutninginum kemur úr láglønarsamfeløgum, sigur Sendistova Føroya í London í frágreiðingini.

Sosialurin fer við eitt annað høvi at venda aftur til aðrar partar í hesi frágreiðing.



*Fundurin, sum Sendistova Føroya í London skipaði fyri á Hotel Hafnia, var almennur, og nógv fólk nýttu høvi at lýða á frágreiðingina, sum varð løgd fram um toska-og hýsumarknaðin í Stórabretlandi - og um okkara støðu sum útflytari*

Mynd: Jens Kr. Vang

# "Hvat er til ráða at taka?"

**– At flyta eina vinnu fram í virðisketuni, er ikki nakað, sum hendir frá degi til dags. Kanska eru forðingarnar ov stórar, og kanska hava vit ikki neyðuga kunnleikan og vitanarstøðið, sum er neyðugt. Men hvørjir møguleikar hava vit so at velja í millum, verður spurt í frágreiðingini hjá Sendistovu Føroya**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað kann tykjast eitt sindur "abstrakt" at siga, at gongdin seinastu árini er eitt úrslit av broyttum kappingarfyritreytum, sum er ein avleiðing av alheimsgerðini, men í stóran mun er hetta veruleikin.

– Spurningurin, vit eiga at seta okkum, er tí: "Hvussu møta vit á bestan hátt hesari avbjóðing, og hvussu tryggja vit, at okkara samfelag ikki bert verður ein útflytari av rávøru, men heldur kann mennast til eitt framkomið fiskivinnusamfelag?

Í frágreiðingini verður hildið fram:

– Vanliga, tá ið tosað verður um alheimsgerðina og ta hóttan, hon er fyri vinnulívið í vesturheiminum, verður sagt, at talan er ikki um eina hóttan, um bert vinnulívið í vesturheiminum klárar at flyta seg fram í virðisketuni - hetta frá sonevndari frumframleiðslu til eina meira vitanartunga framleiðslu. Áherðsla eigur at verða løgd á høgan "produktivitet", vøru- og marknaðarmenning, har vinnan ger sær dælt av tí høga kunnleika og vitanarstøðinum í vesturheiminum. Alheimsgerðin skal vendast frá at vera ein hóttan til ein møguleika.

At flyta eina vinnu fram í virðisketuni, er ikki nakað, sum hendir frá degi til dags - og møguliga ber hetta ikki til yvirhøvur.

– Møguliga eru forðingarnar ov stórar, og møguliga hava vit ikki neyðuga kunnleikan og vitanarstøðið, sum er neyðugt.

Áðrenn hugt verður nærri at hesum viðurskiftum, eiga vit at gera okkum greitt, hvørjir møguleikar eru at velja ímillum.

– Vit hava sett upp nøkur uppskot, men greitt er, at ymisku møguleikarnir allir hava við sær týdningarmikil samfelagslig árin.

Í frágreiðingini verður víst á, at vit kunnu a. lata standa til og einki gera fyri at betra um kappingarførið hjá framleiðsluvinnuni. Vit kunnu b. loyva verksmiðjuskipum at fiska og framleiða tosk og hýsu, sum verður veidd á føroyska landgrunninum - og vit kunnu c. menna landframleiðsluna soleiðis, at hon kann flyta seg fram í virkisketuni.

Sendistova Føroya hevur valt bert at hyggja at møguleika c.

– Vit meta tað ikki vera skilagott bara at lata standa til, og til tess at meta um møguleikan at loyva verksmiðjuskipum at fiska og framleiða tosk og hýsu, sum verður veidd á føroyska landgrunninum, krevur hetta eina neyva kanning. Um hesin møguleiki er skilagóður, bæði vinnuliga og samfelagsliga, hava vit ikki kannað.

Og sagt verður víðari:

– Hyggja vit nærri at møguleika c., sum er at menna landframleiðsluna, soleiðis, at hon kann flyta seg fram í virðisketuni, so hevur hesin møguleiki við sær, at framleiðsluvinnan fer undir øðrvísi framleiðslu av toski og hýsu. Nýggjar vørur mugu framleiðast - til nýggjar marknaðir. Uttan at fara í smálutir, tykist greitt, at framleiðsla av virðisøktum vørum, sum t.d. feskum køldum vørum, innballaðum - ella coated - vørum, royktum vørum og lidnum vørðum, eru hóskandi møguleikar, sigur Sendistova Føroya í London.